# ÚTSKRIFT
## úr
## gerðabók landsstýrisins

Ár 1968, 28. november kl. 10 var fundur í landsstýrinum. Á fundi vóru løgmaður og landsstýrislimirnir Jákup Lindenskov, Sámal Petersen og Villi Sørensen.

Til viðgerðar:

1. Býti av fyrisitingini.
Samtykt varð at býta soleiðis:
Løgmaður: Á lista A í heimastýrislógini nr. 1, nr. 6, nr. 7, nr. 12, bert motor- og ferðsluviðurskifti, nr. 13, undantikið jakt og friðan av djórum á territoriinum, fiskiskapur og friðan av fiski á territoriinum, nr. 14 og nr. 16 undantikið ferðamannaviðurskifti og eins rættindi fyri menn og kvinnur.
Á lista B: nr. 2 og nr. 4.
Jákup Lindenskov: Á lista A nr. 4, nr. 5, nr. 15, undantikið vinnumál og kredittfeløg o. l. tryggingarfeløg í Føroyum og nr. 16 bert eins rættindi fyri menn og kvinnur.
Sámal Petersen: Á lista A nr. 2, nr. 9, nr. 10, nr. 11 og nr. 15 bert kredittfeløg o. l. tryggingarfeløg í Føroyum.
Á lista 13: nr. 1 og nr. 3 bert útvarp, hin tekniski parturin tó undantikin.
Villi Sørensen: Á lista A nr. 8, nr. 12 undantikið motor- og ferðsluviðurskifti, nr. 13 bert jakt og friðan av djórum á territoriinum og fiskiskapur og friðan av fiski á territoriinum, nr. 15 bert vinnumál og nr. 16 bert ferðamannaviðurskiftir.
Á lista B: nr. 3, fyri útvarpið tó bert hin tekniska partin og nr. 5.

2. Val av varaløgmanni.
Sámal Petersen gjørdi vart við, at løgtingslóg nr. 2 frá 13. mai 1948 um umboðsvald Føroya ongan varaløgmann nevnir, men bert sigur, at landsstýrið velur sínámillum hann, sum skal vera í løgmansins stað, tá ið løgmaður hevur forfall. Hetta má skiljast so, at val fer fram hvørja ferð, tá ið løgmanni berst frá, og kundi hann tí ikki luttaka í vali av varaløgmanni.
Hinir limirnir í landsstýrinum, ið skilja § 3 í lóg nr. 2 frá 13. mai 1968 soleiðis, at varamaður fyri løgmann skal veljast samstundis, sum landsstýrið kontituerar seg og ásanna, at soleiðis hevur skipanin verið, valdu Jákup Lindenskov til varaløgmann. Hetta er meirilutastøða og soleiðis samtykt.